Bóndasonurin vi› bass-guitaranum og kolinum

Innan Glyvur búleikast 20 ára gamli Jens L Thomsen. Umframt at ganga til endaliga próvtøku í hesum døgum, hevur Jens eisini tí› til bæ›i tónleik og myndlist

Fróði Løkságarð



– Alt kann vera list, ein bóndi kann líka so væl gera sítt arbei›i til eina list, sum ein sum fæst vi› myndlist, tónleik ella bókmentir. -Eg haldi ikki at ta› er so lætt at definera hvat list er. Or›ini eigur Jens L. Thomsen, sum í eini fríløtu frá lestrinum til endaligu próvtøkuna hevur játta› at hitta eitt umbo› fyri Yngd í hugnaligu bóndahúsunum Innan Glyvur. Jens strí›ist í hesum døgum vi› seinastu skrivligu royndirnar eftir at hava gingi› í studentarskúla á Kambsdali í tr‡ ár. Um nakrar vikur er alt strí›i› av, og Jens og floksfelagarnir fáa húgvuna setta á høvdi›.

Beinavegin tú møtir Jens, so fært tú varhugan av, at her er talan um ein skapandi mann. Ilt er at siga hvat ta› er sum ger ta›, men hann hevur okkurt yvir sær, sum útstrálar at hetta er ein ma›ur vi› ø›rum evnum enn teimum at gáka upp. Sum práti› gongur, so ger›st ta› alsamt tí›iligari, at Jens eisini er ein hugsandi ungur ma›ur, sum hevur sínar vælgrunda›u meiningar um tey flestu av lívsins vi›urskiftum.

Ætli mær ikki at vera bóndi

– Nei, eg ætli mær ikki at vera bóndi. Hetta er stutta svari›, tá vit í gamla Opel Rekord bilinum hjá Jens, sum hann hevur ogna› sær fyri 1200 krónur, koyra framvi› einum stórum traktori ella onkrum sum líkist einum tílíkum, hjá pápa hansara, á veg úr Skálbotni heim til Jens, har ein spruttandi kaffikanna bí›ar okkum. Og sum vit í gó›ve›rinum spakuliga førka okkum út eftir skálafjør›inum grei›ur Jens frá um henda gamla bilin, og hvat hann skal gera vi› hann. Hann vil tó ikki vi›ganga at hann er tann stóri bilsmi›jurin. – Ta› er av ney›. Tá man gongur í skúla og skal liva av studningi, so er man noyddur at bróta upp um armar sjálvur, men beiggi mín hevur hjálpt mær væl.

Sum sagt er Jens 20 ára gamal. Mamman er úr Klaksvík og pápin er danskari, men enda›i sum bóndi í Føroyum. Eftir at hava bú› í Danmark tríggjar teir fyrstu mána›arnar av sínum lívi, flutti Jens saman vi› familjuni heim til Føroyar at búgva. Sí›ani hann kom heim, hevur hann bú› vi› Skálafjør›in. Fyrst á Glyvrum, á›renn tey fluttu út á Strendur, ha›ani tey fyri 15 árum sí›ani fluttu til núver›andi bústa›in Innan Glyvur.

Prix og Grand Prix

Tey sum hava áhuga í tónleiki í Føroyum hava sikkurt hoyrt um bólkin Clickhaze, sum kom fram vi› eitt brak til seinastu Prix Føroyar kapping. Jens spældi bass í Clickhaze. Áhugin fyri tónleiki hjá Jens gongur langt aftur. – Eg minnist væl tá Herreys vunnu Grand Prixi› í 1984, tá plagdi eg at lurta eftir teimum, men kanska var ta› bara fyri at herma eftir beiggja mínum sum er eldri enn eg. Í øllum førum var hatta naka› av tí fyrsta eg lurta›i eftir.

Sjálvur byrja›i Jens at spæla tónleik, tá hann keypti ein akustiskan guitar frá pápanum hjá einum vinmanni hjá sær. – Eg fekk hana fyri 400. kr, ta› er faktist ein gó› guitar. Seinni var eg so b‡ttur at b‡ta hana um vi› ein el-guitar, ta› angri eg enn. Jens livur tó framvegis í vónini um at fáa hendur á henni aftur.

Fyrsta guitarin

Sum sagt var ta› ikki akustiska guitarin sum var ljó›føri› hjá honum í Clickhaze. – Sjálvt um bass guitarin meir ella minni er høvu›sljó›føri›, so havi eg spælt rættuliga nógv guitar. Ta› seinasta n‡ggja hjá Jens á tónlistarliga økinum er, at hann er farin at spæla trummur. – Eg eri vi› í einum bólki á studentarskúlanum, sum nevnist Marygold, har spæli eg trummur. Vit hava spælt saman í eina tí› nú, og vit hava eisini spælt alment nakrar fáar fer›ir, sigur Jens ví›ari. Tá partvís føroyski bólkurin Glorybox í summar væntandi aftur kemur higar á vitjan, er ætlanin at Marygold skal vera upphitingarbólkur. Eftir sum Jens grei›ir frá, so spæla Marygold nokkso har›an og larmandi tónleik, sum ikki liggur heilt langt burtur frá noise poppinum hjá Glorybox.

Jens vi›gongur, at hann gott kundi hugsa› sær at gjørt meiri vi› tónleikin Nú tá studentarskúlin ver›ur li›ugur í summar er møguleiki at fara út um landoddarnar á tónleikarskúla. – Eg kundi gott hugsa› mær at lagt meg eftir at spælt bass. Sjálvur lurtar Jens eisini nógv eftir tónleiki, og hevur eina meining um ta› hann hoyrir. – Eg leggi einki í, um ta› ikki er so ótrúliga gott spælt, ta› sum er mest umrá›andi vi› tónleiki eins og vi› allari a›rari list, er at ta› er sál í. Tí kann eg gott fáa nógv meiri burtur úr onkrum sum kanska ikki dugir serliga væl at spæla, men meinar ta›, enn burtur úr einum tekniskt dugnaligum tónleikara, sum kanska ikki meinar ta› so álvorliga.

Myndlistin

Tónlistin er ikki einasta listargreinin sum Jens fæst vi›. Tey sum hava áhuga í myndlist og ganga til tær frams‡ningar í vera fyriskipa›ar, hava óiva› rent seg í nanvi› Jens L. Thomsen. Bæ›i til ólavsøkuframs‡ningina í fjør, og várframs‡ningina í ár, hava listaverk hjá Jens veri› vi›.

– Eg haldi, at eg altí› havi tekna›, ella í øllum førum so leingi eg havi duga› at hildi einum bl‡anti. Jens veit ikki heilt at siga, um hetta er naka› sum gongur aftur innan fyri familjuna, hann veit so bara um ommuna í Danmark sum hevur fingist naka› vi› at tekna.

Sjálvur er Jens ikki nøgdur vi› tey verk í higartil hava veri› s‡nd fram hjá honum. Tá Yngd so konfronterar hann vi› ta› faktum, at bá›ar hesar frams‡ningar eru úrvælsframs‡ningar, har ta› ikki er lætt at sleppa gjøgnum nálareyga›, svarar hann bara, at ta› má vera tí ta› hendir ov líti› millum ung føroysk listarfólk, og ta› helst er mangul uppá listafólk og listarverk.

Íblástur úr tónleiki

Enn er ta› bara bl‡anturin og kriti› sum eru ambo›ini hjá Jens, tá hann skal avmynda ta› sum gongur fyri seg inni í høvdinum á honum. – Eg ætli mær eisini at fara at mála, eg eri bara ikki komin til ta› enn, eg vil royna alt, sigur hann, tá vit spyrja hví ta› bara eru tekningar sum higartil eru komnar úr hansara hondum.

Tónleikurin er eisini tí›andi partur tá Jens teknar. Til ólavsøkuframs‡ningina í fjør, hev›i hann eina myndarø› vi› sum tók stø›i› í húsanum til fløguna Mamouna hjá gamla Roxy Music sangaranum Brian Ferry. — Tá eg tekna›i tær myndirnar, koyrdi Mamouna fløgan hjá Bryan Ferry nærum út í eitt í fløguspælaranum i eina heila viku.

Vil ikki ver›a settur í bás

Umframt at hava áhuga í tónleiki, list og bókmentum, so hevur Jens eisini sínar grei›u hugsanir um lívi› og trúgv. Sjálvur er hann trúgvandi, og hoyrir heima í brø›rasamkomuni á Skála. Hóast tónleikur hann spælir vi› Clickhaze og Marygold. – Eingin sigur, at man absolut skal proppa Jesus ni›ur í hvønn poppsang, ta› kann gott blíva for trongt har, sjálvt hjá honum.

Eisini alt ta› vi› at seta fólk í bás, ella at bólka fólk, vísir seg at passa Jens illa. – Mær dámar ikki hatta har, vi› at hann er babs, hann er kirkjufólk, ella ta› ver›ur seg okkurt heilt anna›. Hann fortelur frá, at tá hann gekk á eftirskúla ni›ri í Danmark, á›renn hann fór undir studentarskúlan, var grungebylgjan uppá ta› hægsta, og bólkar sum Pearl Jam og Nirvana vóru nógv at hoyra. – Sjálvt um mær dámdi tónleikin hjá teimum, og alt tunglyndi› sum hekk uppi í, so nokta›i eg allíkavæl fyri at bara at halda saman vi› teimum sum livdu grunge fult út. Hatta er aftur okkurt vi› hasum har, at vera settur í bás, eg havi trongd til at hava frælsi› at vera eg sjálvur, sigur Jens.

Frælsi ella vælfer›

Í hesum fullveldistí›um hevur Jens gjørt sær sínar hugsanir um politikk, samaband og loysing, og ta› kennist sum at ta› serliga er spurningurin um møguliga at noy›ast at velja millum frælsi og vælfer› sum upptekur hann. Hóast hann ikki tónar reint flagg politiskt, so ivast hann í, um hann ikki hev›i sett krossin vi› fullveldi, til eina møguliga fólkaatkvø›u. Men enn er hetta bara ein hypotetiskur spurningur fyri okkum, tí enn er ikki nakar dagur settur fyri nær vit sleppa at gera upp vi› okkum sjálvi. Til tann dagur kemur er framvegis tí› at meta um fyrimunir og vansar, og spurningin um, hvat vigar tyngri frælsi og stoltleiki ella vælfer›.

Vit enda›u vi› at spyrja Jens um hvat nú var á skránni, nú skúlagongdin brátt fer at gerast søga. — Jú, eg havi ætlanir um at fara at brúka eitt sindur meiri tí› uppá tónleikin og myndlistina. Ætlanin hja Jens er at fáa eina frams‡ning vi› egnum myndum upp at standa, á›renn alt ov leingi. Hann hevur hevur fult høvd av hugskotum, og fleiri koma alla tí›ina. Eisini tá hann stendur og veltur.